**Samferðsluundirstøðukervisbólkurin**

## Tilmæli til raðfesting og fígging av ávísum íløgum í samferðsluundirstøðukervið

Á fundi 17. mai í Tinganesi viðgjørdu umboð fyri landsstýrið, samgonguna, stovnar á samferðsluøkinum og embætisfólk møguligar íløgur í samferðsluundirstøðukervið.

Heitt varð á bólk av embætisfólki úr Samferðslumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum og Løgmansskrivstovuni um at gera eina greining av møguligu íløgunum í samferðsluundirstøðukervið við atliti til raðfesting og fígging.

Greiningin er ætlað sum eitt íkast til politisku avgerðina um raðfestingina av ymsum íløgum í samferðsluundirstøðukervið og fíggingina á løguætlanini.

Í tilmælunum hjá bólkinum niðanfyri verður broytingin í løguætlanini árliga ímillum 41, 64, 35 og 76 mió.kr árini 2019-23 og síðani –75 til -100 mió.kr í 2024.

Byggivirksemið í landinum er høgt í løtuni, bæði privat og alment, men metir bólkurin kortini, at tilmæltu hækkingarnar í løguætlanini eru ráðiligar.

Tekur landsstýrið undir við tilmælunum hjá bólkinum, og samstundis ynskir at halda seg innanfyri verandi løguætlan, mugu aðrar verkætlanar á løguætlanini umraðfestast.

### 1. Størru tunnilsverkætlanirnar

Í lógaruppskoti frá andstøðuni varð skotið upp, at Norðoyatunnilin stóð fyri byggingini av Tunlum Norður um Fjall, fíggjaði byggingina við 80 mió.kr av nýtslugjaldi og síðani fíggjaði restina á løguætlanini.

Uppskotið brýtur við siðvenjuna higartil, at landið skipar fyri bygging av tunlum á landi, har einki nýtslugjald verður kravt.

Eftir uppskotinum hjá andstøðuni var ætlanin at fara í gongd við Tunlar Norður um Fjall beinanvegin, tvs samstundis sum Hvalbiartunnilin verður gjørdur.

Bólkurin er av tí fatan, at hetta hevði økt ov nógv um samlaða byggivirksemið, og kappingin um at gera tunlarnar hevði sannlíkt verið minni.

Sambært verandi løguætlan standa Tunlar Norður um Fjall til at byrja í 2022. Politiskt er ynski um at framskunda hesar tunlar. Niðanfyri síggjast tilmælini frá bólkinum um framskunding av størru tunnilsverkætlanunum.

### 1.1 Hvalbiartunnilin

Verklagslógin um Hvalbiartunnilin er nýliga samtykt i Løgtinginum. Eftir er at prosjektera tunnilsarbeiðið liðugt og bjóða verkætlanina út.

Eftir løguætlanini stendur Hvalbiartunnilin til at byrja í 2019 og enda í 2022. Hetta er eitt ár seinni enn byggigongdin í verklagslógini.

Landsverk (LV) hevur lýst ein skjótari leist, har ið meir fíggjartørvurin er 20 mió.kr í 2018 og 90 og 65 mió.kr í 2019-20. Bólkurin metir tó, at hetta hevði økt í meira lagi um samlaða byggivirksemið.

Bólkurin mælir til, at arbeiðið upp á Hvalbiartunnilin verður framskundað til at fylgja byggigondini í verklagslógini; við smærri tillagingum. Tvs ein meir fíggjartørvur á 40 og 55 mió.kr árini 2019-20 í mun til løguætlanina.

Av tí, at høvuðstilmælið hjá bólkinum er at framskunda Tunlar Norður um Fjall, og at hetta arbeiðið fer í gongd beint eftir Hvalbiartunnilin, verður mælt frá at knýta Famjinstunnilin upp í Hvalbiartunnilin.

### 1.2 Tunlarnir Norður um Fjall

Ivaleyst er, at Tunlarnir Norður um Fjall við atliti til trygd, virksemi og menning í økinum eiga at verða gjørdir sum skjótast. Teir eru frá fyrru hálvu av sekstiárunum og eru ótíðarhóskandi.

Tunlarnir eru so mikið stór verkætlan, at teir eiga at verða bodnir út til størri byggifyritøkur at gera. Verklagslóg er samtykt fyri verkætlanina fyri fleiri árum síðani, so í so máta er klárt at fara í gongd.

Bólkurin mælir til, at boriarbeiðið upp á Tunlar Norður um Fjall byrjar, tá Hvalbiartunlinum er liðugt boraður.

Útboðið av tunlunum kann vera hvør sær ella saman, eins og t.d gjørt var fyri Eystur- og Sandoyartunlar. Men týdningarmikið er, at útboðshátturin ikki seinkar verkætlanunum.

Í verandi løguætlan byrjar arbeiðið uppá Tunlar Norður um Fjall í 2022, og koyrandi er í 2024.

Ein skjótari leistur er sbrt LV byrjan í 2019 og endi tíðliga í 2023 við meir fíggjartørvi á 8, 50, 147 og 100 mió.kr árini 2019-22. Bólkurin metir sum víst á omanfyri, at hetta hevði økt í meira lagi um samlaða byggivirksemið.

Bólkurin mælir til at framskunda verkætlanina til at fyrireika í 2020, byrja arbeiðið í 2021, so liðugt er seint í 2023. Hetta hevur við sær ein meir fíggjartørv árini 2020-23 á ávikavist 10, 67, 125 og 70 mió.kr í mun til løguætlanina.

## 2. Tunnnilstoymið – Famjins- og Dalstunnilin

Politiskt tykist ikki vera semja um, hvønn av teim smærru tunlunum, ið Tunnilstoymið skal seta hol á fyrst.

LV mælir til at fara í gongd við Dalstunnilin fyrst, tí tann farleiðin er so vánalig sum er. LV mælir eisini til, at árliga játtanin verður 20 mió.kr.

Landsstýrismaðurin í samferðslumálum mælir til at byrja við Famjinstunlinum, sum er væl styttri enn Dalstunnilin, og skjótari kann farast í gongd, tí færri fyrireikingar skulu gerast.

Í løguætlanini eru 7 mió.kr settar av árliga árini 2018-20 og síðani 12 mió.kr árliga frameftir.

Bólkurin mælir til, at árliga játtanin verður 12 mió.kr frá 2019, so toymið kann fáa ein skilagóðan rakstur. Hetta gevur ein meir fíggjartørv á 5 mió.kr árini 2019-20.

Sum víst á omanfyri, mælir bólkurin frá at knýta Famjinstunnilin upp í Hvalbiartunlinum.

Bólkurin hevur einki tilmæli til, hvør av smáu tunlunum skal byrja fyrst. Hetta verður politiska skipanin at taka støðu til.

## 3. Undirsjóvartunlarnir og nýtslugjøldini

Lánið í Vágatunlinum (VT) er afturgoldið, og lánið í Norðoyatunlinum (NT) er nærum afturgoldið. Samstundis er Føroya størsta byggiverkætlan, Eysturoyar- og Sandoyartunlar, í gongd.

Hóast ymsar fatanir hava verið av, nær tunlarnir fella aftur til landið, hava undanfarna og verandi landsstýrið tulkað verklagslógirnar fyri VT og NT soleiðis, at bæði lán og partapeningur skal rindast aftur til landskassan.

Um landið yvirtekur undirsjóvartunlarnar, og nýtslugjaldið verður tikið av, kemur LV alt annað líka at mangla í miðal 15 mió.kr árliga í rakstri, viðlíkahaldi og dagføringum.

LV hevur seinastu mongu árini hevur havt trupult við at fáa nøktandi fígging til viðlíkahald og rakstur av landsvegakervinum, og hevur tí eitt ovurstórt eftirsleip í viðlíkahaldinum á landsvegakervinum.

Bólkurin er av tí fatan, at nýtslugjøld í undirsjóvartunlunum eru trygd fyri, at nøktandi fígging altíð er tøk til viðlíkahald og dagføringar í undirsjóvartunlunum.

Bólkurin sær fíggjarligar og rakstrarligar fyrimunir við at leggja øll tunnilsfeløgini saman, men metir tað vera skilabest at bíða við samanlegging, til Eystur- og Sandoyartunlar eru tiknir í nýtslu.

**Samferðsluundirstøðukervisbólkurin**

Um partafeløgini VT og NT fram til møguliga samanlegging hava gjaldførisavlop eftir avseting til viðlíkahald og dagføringar, kann gjaldførisavlopið verða nýtt til fígging av tilmæltu hækkaðu løguætlanini.

**4. Innkomuvegurin til Havnar**

Av tí, at enn ikki er byrjað upp á arbeiðið at gera innkomuvegin til Havnar, verður hesin ikki liðugur, áðrenn Eysturoyartunnilin verður tikin nýtslu, sjálvt um full ferð hevði verið sett á arbeiðið í hesum árinum.

LV hevur víst á, at við atliti til væntaða ferðslulopið í metingum av framtíðar ferðslumynstrinum, kann tað vera váðið at lata Eysturoyartunnilin upp fyri ferðslu uttan at hava innkomuvegin lidnan.

Tó er ikki vist, at ferðslulopið kemur eftir einum degi, men kanska meiri líðandi, og mest týðandi er, hvussu stórt ferðslulopið er í háferðslutíð.

Nýggja ferðsluljósskipanin á Hvítanesvegur/Eystari ringvegur væntast eisini at muna. At Studentaskúlin í Hoydølum flytir út í Vesturbýin fer eisini at minka um talið av akførum í háferðslutíð.

Veksur ferðslan frá byrjan meira enn væntað, kann hon í eina tíð verða stýrd við at áseta hægri prís fyri at koyra ígjøgnum tunnilin í háferðslutíð.

Kannað er, um Eysturoyar- og Sandoyartunlar (EST) kunnu rinda meira til innkomuvegin enn avtalað. Hetta ber ikki til, tí fíggingin av EST er neyvt bundin at verkætlanini, sum hon varð boðin út.

Landsins lutur av 1. parti av innkomuvegnum er mettur at kosta 115 mió.kr. Antin 2. partur verður ein vegur ella tunnil, er landsins lutur á leið helvtin, t.e 75-100 mió.kr.

Bólkurin mælir til at seta pening av til innkomuvegin árið eftir, at koyrandi er í Eysturoyartunlinum, og ferðslumynstrið er kent.

Til 1. part verða settar 20 mió.kr av í 2021, og síðani 55 og 40 mió.kr í 2022-23. Til 2. part verða settar av 75-100 mió.kr í 2024.

**5. Samhaldsfasti samferðsluundirstøðukervisgrunnurin**

Í kjakinum um samhaldsfasta fígging av samferðsluundirstøðukervinum hevur verið skotið upp at savna avgjøld, ið hava við samferðslu at gera, í grunn at rinda fyri útbyggingar og viðlíkahald.

Nevnast kunnu avgjøld sum vektgjaldið, brennievnisavgjaldið, skrásetingargjaldið og ymisk avgjøld á ferðafólk.

Bólkurin mælir frá at seta slíkan grunn á stovn, tí hetta stríðir ímóti tveimum meginreglum. Tann eina er, at skattir og avgjøld ikki skulu oyramerkjast til ávísa nýtslu, men eru til at fíggja samlaðu útreiðslur landsins.

Hin meginreglan er, at alt virksemi landsins skal vera á fíggjarlógini. At flyta virksemi av fíggjarlógini gevur minni gjøgnumskygni. Higartil hava einans byggiverkætlanir við nýtslugjaldi ligið uttanfyri fíggjarlógina.

Politiska skipanin hevur ábyrgd av, at byggivirksemi landsins er ráðiligt í mun til samlaða byggivirksemi, herundir at raðfesta imillum byggiverkætlanir, sum tørvur er á.

Við at leggja uppaftur meira byggivirksemi út um fíggjarlógina livur politiska skipanin ikki upp til sína ábyrgd.

Tinganes, 28. juni 2018

**Í Samferðsluundirstøðukervisbólkinum hava sitið:**

Fyri Samferðslumálaráðið: Niels Juel Arge, fulltrúi og Atli Eiriksson, ráðgevi
Fyri Fíggjarmálaráðið: Atli Suni Leo, ráðgevi
Fyri Løgmansskrivstovuna: Flóvin Eidesgaard, búskaparráðgevi

**Samferðsluundirstøðukervisbólkurin - 28. juni 2018**

| HVALBIARTUNNILIN | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Løguætlan | 778 | 7.000 | 30.000 | 50.000 | 130.000 | 55.000 | | | 272.778 |
| Skjótasta loysn | 778 | 27.000 | 120.000 | 115.000 | | | | | 262.778 |
| Verklagslóg (tillagað) | 778 | 7.000 | 70.000 | 105.000 | 90.000 | | | | 272.778 |
| **Munur:** Skjót loysn í mun til løguætlan | | **20.000** | **90.000** | **65.000** | **-130.000** | **-55.000** | | | **-10.000** |
| **Munur:** Verklagslóg í mun til løguætlan | | | **40.000** | **55.000** | **-40.000** | **-55.000** | | | **0** |
| **NORÐUR UM FJALL** | | | | | | | | | |
| Løguætlan | | | 2.000 | | 3.000 | 50.000 | 100.000 | 175.000 | |
| Skjótasta loysn | | | 10.000 | 50.000 | 150.000 | 150.000 | 55.000 | | 415.000 |
| Bólkurin | | | | 10.000 | 70.000 | 175.000 | 170.000 | | 425.000 |
| **Munur:** Skjót loysn í mun til løguætlan | | | **8.000** | **50.000** | **147.000** | **100.000** | **-45.000** | **-175.000** | |
| **Munur:** Bólkurin í mun til løguætlan | | | **-2.000** | **10.000** | **67.000** | **125.000** | **70.000** | **-175.000** | |
| **TUNNILSTOYMIÐ - smátunlar** | | | | | | | | | |
| Løguætlan | | 7.000 | 7.000 | 7.000 | 12.000 | 12.000 | 12.000 | 12.000 | 69.000 |
| LV | | 7.000 | 20.000 | 30.000 | 20.000 | 20.000 | 35.000 | 20.000 | 152.000 |
| Bólkurin | | | 12.000 | 12.000 | 12.000 | 12.000 | 12.000 | 12.000 | 72.000 |
| **Munur:** LV í mun til løgætlan | | | **13.000** | **23.000** | **8.000** | **8.000** | **23.000** | **8.000** | **83.000** |
| **Munur:** Bólkurin í mun til løguætlan | | | **5.000** | **5.000** | | | | | **10.000** |
| **INNKOMUVEGURIN** | | | | | | | | | |
| Løguætlan | 601 | 6.500 | 2.000 | 6.000 | 12.000 | 54.000 | 34.500 | | 115.601 |
| LV | 601 | 6.500 | | | 55.000 | 53.500 | 75.000 | | 190.601 |
| Bólkurin | 601 | | | | 20.000 | 55.000 | 40.000 | 75.000 | 190.601 |
| **Munur:** LV í mun til løguætlan | | | **-2.000** | **-6.000** | **43.000** | **-500** | **40.500** | **0** | **75.000** |
| **Munur:** Bólkurin í mun til løguætlan | | **-6.500** | **-2.000** | **-6.000** | **8.000** | **1.000** | **5.500** | **75.000** | **75.000** |
| **Nýggj løguætlan** | **353.389** | **422.000** | **465.900** | **494.700** | **494.400** | **460.700** | **479.300** | **-100.000** | |
| **Munur,** (hækking +/lækking -) | 0 | -6.500 | 41.000 | 64.000 | 35.000 | 71.000 | 75.500 | -100.000 | 180.000 |